## Eingin promillukoyring

Í sambandi við KÌ-veitsluna fór løgreglan manssterk út um miðnáttarleitið, fyri at kanna bilførararnar fyri rúsdrekkakoyring. Eini 50-60 bilar vórðu steðgaðir, men ikki ein einasti varð yvir promillumarkið. – Tað er bara gleðiligt, at fólk her norðuri duga at uppføra seg, staðfestir vakthavandi.

## Útblakaður

Leygarkvøldið var ein gestur á einum lokalum vertshúsið í Klaksvík, sum ikki dugdi at uppføra seg ordiliga. Viðkomandi varð tí blakaður út. Løgreglan varð tilkallað, og maðurin var tveittur út á ein heldur ógvusligan hátt. Tað stendst tó ikki meira av málinum.

## Rok á KÍ-veitsluni

Leygarkvøldið var KÍ-veitsla hildin í ítróttarhøllini í Klaksvík. Vakthavandi sigur, at tað gekk sera friðarligt fyri seg, tó at tað einaferð um 5 tíðina sunnumorgunin var nakað av rokið uttanfyri høllina. Eini 10-12 mans vóru farnir upp at kjakast, allarhelst um fótbólt, og tað endaði við, at teir allir fóru til hendurs. Tveir av monnunum endaðu á skaðastovuni, men vakthavandi sigur, at tað fyribils ikki verður nøkur sak burturúr málinum.

– Allir menninir vóru ávirkaðir av rúsdrekka og teir høvdu allir sligið, so tað er hopleyst at greina eitt slíkt mál út í æsir. Eitt tílíkt mál verður bert noterað sum »slagsmál«, ikki harðskapur, og tí verður fyribils ikki meir gjørt við tað, greiðir vakthavandi í Klaksvík frá. Hann sigur, at tá løgreglan kom á staðið góvust menninir av sær sjálvum, so tað var ikki neyðugt hjá løgregluni at leggja uppí.

# Bush kann gerast avgerandi fyri Fogh

**Í krókunum á Christiansborg, verður nógv gitt um fólktingsval í ótíð. Meiningarnar eru ymiskar, men verður val, kann henda, at Bush verður ein trupulleiki fyri Fogh**

FÓLKATINGIÐ
*Marjun Dalsgaard*
*Christiansborg*



*Tað er ikki vist, at danir góðtaka, at teirra stjórn stuðlar politikkinum hjá Bush, um hann fer undir enn eina hernaðarliga einagongd*

Danir hava ikki fyri vana at lata uttanríkispolitikk ávirka teirra val til fólkatingið, og tað gera teir møguliga heldur ikki hesa ferð. Tó er tað ikki óhugsandi, at amerikanska forsetavalið fær ávirkan á eitt komandi fólkatingsval. Hóast kanningar vísa, at fleiri og fleiri danir taka undir við krígnum í Irak, siga aðrar kanningar, at teir eisini eru sera ónøgdir við tætta samarbeiðið millum afturvalda amerikanska forsetan George W. Bush og teirra egna forsætisráðharra, Anders Fogh Rasmussen.

Tað er tí nærliggjandi, at andstøðan við Mogens Lykketoft á odda fer at brúka George W. Bush í einum valstríði til fólkatingsvalið, eins og støðan í Irak væntandi fer at fylla nógv. Ein orsøk til hettar er, at lítil og eingin munur er á politikkinum hjá stjórnini og andstøðuni - hvørgin teirra hevur hug at flyta seg frá tí breiðu miðjuni, ið tryggjar ein valsigur, og uttanríkismál kunnu tí gerast avgerandi. Evnini, sum skilja partarnar og kunnu brúkast í valstríðnum eru tætta samstarvið millum Fogh og Bush, danska luttøkan í Irak og útlendingaspurningurin.

### Bush í valstríðnum

At síggja til hevur tað ikki ávirkað undirtøkuna hjá Anders Fogh Rasmussen, at hann tekur undir við uttanríkispolitikkinum hjá Bush. Seinastu veljarakanningarnar vísa, at hann er væl-dámdur. Men hetta kann sjálvsagt broytast undir einum valstríði - tað velst um, hvønn politikk Bush fer at reka, og hvussu danir taka tað. Tað er ikki vist, at danir góðtaka, at teirra stjórn stuðlar politikkinum hjá Bush, um hann fer undir enn eina hernaðarliga einagongd. Eftir amerikanska forsetavalið søgdu bæði Anders Fogh Rasmussen og uttanríkisráðharri hansara, Per Stig Møller, at nú fóru vit at síggja ein annan Bush - ein bleytari Bush, sum fór at rætta altjóða samfelagnum hondina og skapa frið í miðeystri. Síðan hevur einki týtt uppá, at teir høvdu rætt í hesum. Tvørturímóti hava bæði Bush og Powell sagt, at teir síggja valúrslitið 3. november sum eitt atgongumerki til at halda somu leið. At Fogh og Per Stig Møller vóna nakað annað kann skiljast sum ein óbeinleiðis atfinning móti politikkinum hjá Bush í undanfarna valskeiði. Hetta kann bæði føra við sær, at danski veljarin ber yvir við stuðlinum til Bush júst í krígnum móti yvirgangi, men kann eisini skapa ónøgd, um Anders Fogh Rasmussen stendur við sín stuðul til Bush, hóast hesin velur eina enn harðari kós enn higartil á uttanríkisumráðnum.

### Útlendingakjak

Eitt annað mál, sum helst stingur seg upp til eitt komandi fólkatingsval er útlendingamálið, og eru viðurskiftini við Bush óheppin fyri Fogh, so kann útlendingakjakið gerast sera óheppið fyri formannin í danska Javnaðarflokkinum, Mogens Lykketoft. Umframt at Karen Jespersen júst hevur klamsað við hurðunum á Christiansborg og er rýmd, tí Javnaðarflokkurin eftir hennara meting førur eina ov lina útlendingalinju, hevur flokkurin slingrað so nógv á hesum økinum, at hann hevur mist veljarar bæði til høgru og vinstru síðan 1997, tá Pia Kjærsgaard av álvara trein inn á politiska pallin við evninum "de fremmede", sum hon kallaði tey tá. Javnarðflokkurin hevur aldrin megnað at finna eina leið, ið flestu veljarir teirra kunnu góðtaka. Hinvegin hevur VK stjørnin saman við Dansk Folkeparti staðið sera føst í sínum útlendingapolitikki, og hevur harumframt júst varpað ljós á málið í sambandi við viðgerðina av fíggjarlógini, har tað varð avgjørt at asylsøkjarir, ið hava fingið noktað uppihald í Danmark skulu sendast heim beinanvegin. Vilja heimlondini ikki taka ímóti teimum, verður skorið í menningalandshjálpini, sum hesi lond annars fáa úr Danmark. Fyri Piu Kjærsgaard er hetta enn eitt kærkomið høvi at vísa sínum veljarum, at hon ger nakað við síni aðalmál.

# Fólkatingsval nærkast

**Tað tykist heilt greitt, at fólkatingsval kann verða útskrivað, nær tað skal vera. Fíggjarlógin fyri 2005 traðkar ongum á tærnar, og forðar tí ikki fyri, at val verður í januar**

FÓLKATINGIÐ
*Marjun Dalsgaard*
*Christiansborg*

Fólkatingsval kann verða útskrivað hvørja løtu, og sjálvt um teir hava hoyrt tað fyrr, hava donsku andstøðuflokkarnir ikki ráð til at sita eftir á. Teir eru farnir í valstríð. Prenta plakatur og dyrgja eftir atkvøðum. Flokkarnir liggja í støð-ugum valstríði uttan at vita nær valið verður — og um tað verður. Tað er bert ein, ið veit við hetta vissu, og tað er Anders Fogh Rasmussen. Maðurin er kendur fyri sítt taktiska snildi, og um tað er tilætlað ella ikki, argar hann andstøðuna og syrgir fyri, at hon er undir konstantum trýsti – klár til val.

Fíggjarlógin fyri 2005, sum varð samtykt mikudagin, kann metast sum enn eitt stig móti einum Fólkatingsvali. Hon er vandaleys og traðkar ongum á tærnar. Búskaparfrøðingar siga, at hon ikki er serliga áhugaverd reint politiskt og ber brá av, at stjórnin ikki vil stoyta nakran frá sær.

Serliga Dansk Folkeparti kann gleðast um, at tey hava fingið síni yndismál ígjøgnum — til dømis fáa tey eldru nógv burturúr nýggju fíggjarlógini. Hartil fekk Pia Kjærsgaard enn einaferð sett fokus á útlendingapolitikkin, tá hon í síðstu viku noktaði at viðgera fíggjarlógina, um VK stjórnin ikki lovaði at senda teir 2.200 asylsøkjararnir heim beinanvegin, sum hava fingið noktað uppihaldsloyvi í Danmark. Ein strangur útlendingapolitikkur er eisini gott valagn í Danmark í dag.

Stóra undirtøkan, sum Anders Fogh Rasmussen fær í veljarakanningum nú, kann eisini merkja, at val verður skjótt. Seinasta veljarakanningin hjá Rambøll Management gav stjórnini og stuðulsflokkinum Dansk Folkeparti 88 mandatar tilsamans, og tað er nokk til, at hon kann verða sitandi.



# SL hevur lurtað eftir kalsoyingum

**Stjórin á Strandferðsluni sigur, at í sambandi við nýggju ferðaætlanina til Kalsoynna, hevur Strandferðslan lurtað eftir ynskjunum frá fólkinum í oynni**

SAMFERÐSLA
*Eyðun Klakstein*

Stjórin á Strandfaraskipum Landsins stendur spyrjandi, nú borgarstjórarnir í Klaksvík og í Mikladali hava sent landsstýrismanninum skriv um at fáa túrar millum Klaksvík og Kalsoynna fyrr og seinni á degnum.

– Tá ið vit arbeiddu við nýggju ferðaætlanini, gjørdu vit tað í samstarvi við Útoyggjafelagið. Fólk í Kalsoynni vóru spurd um ferðaætlanina, og vit hava tikið hædd fyri tí í uppskotinum, sigur Kristian Davidsen, stjóri á SL.

Um ársskiftið verður nýggja ferjulegan á Syðradali tikin í nýtslu, og tað er í tí sambandinum, at nýggj ferðaætlan verður gjørd. Bilferja skal sigla millum Klaksvík og Kalsoynna.

### Kvøldtúrar ikki við

Borgarstjórarnir í Klaksvík og í Mikladali siga í brævi til Jógvan við Keldu, landsstýrismann, at neyðugt er við fleiri túrum – bæði tíðliga á morgni og seint á kvøldi.

– Hetta var ikki partur av arbeiðnum við nýggju ferðaætlanini, og tað er eitt heilt annað mál at fáa kvøldtúrar, tí tá er helst neyðugt við eini manning afturat, og tað kostar pengar, sigur Kristian Davidsen.

### Landsstýrismaður uppí

Í brævinum siga borgarstjórarnir, at sambært tølum hjá Strandferðsluni fer tað at kosta eina góða millión krónur at fáa fleiri túrar, men hetta talið kennir stjórin á Strandferðsluni einki til.

– Vit hava ikki kannað, hvat tað fer at kosta at sigla kvøldtúrar til Kalsoynna, og tí kunnu vit ikki siga nakra upphædd, sigur hann. Kristian Davidsen fjalir tó ikki út yvir, at skal Strandferðslan røkja sigling seint á kvøldi í Kalsoynna, so er neyðugt við fleiri almennum krónum.

Málið er nú farið til Jógvan við Keldu, landsstýrismann, og hann eigur ein avgerandi leiklut, skulu pengar játtast til Kalsoyarleiðina.

# Bara roynd fólk í bygdaráðið

**Fýra av teimum fimm bygdaráðslimunum, sum hava sitið í bygdaráðnum á Viðareiði seinastu fýra árini, vóru afturvaldir á valinum hesaferð**

BYGDARÁÐ
*Eyðun Klakstein*

**Viðareiði:** Tríggir listar vóru stillaðir upp, og allir fingu umboð í bygdaráðið. Á lista A, sum fekk flestar atkvøður, vóru valdir Kári Kallsberg og Hans Jákup Kallsberg.

Á lista B, sum var listin hjá borgarstjóranum Jógvani Nybo, vóru tvey umboð vald – Árni Absalonsen og Jógvan Nybo. Merkisvert var tað, at borgarstjórin misti fitt av atkvøðum á hesum valinum, men hann varð valdur væl og virðiliga fyri tað.

Á lista C var eitt umboð valt, og tað var royndi politikarin Mamy Dahl Sørensen, sum áður hevur sitið í bygdaráðnum á Viðareiði.

Nýggja bygdaráðið á Viðareiði hevur ikki skipað seg enn, og tað tykist ikki verða greit, um Jógvan Nybo heldur fram sum borgarstjóri ella um eitt av hinum fýra fólkunum skulu taka við.

# Borgarstjórin fekk flestar atkvøður

**Enn er ikki greitt, um Zacharias Zachariassen heldur fram sum borgarstjóri í Fugloy**

BYGDARÁÐ
*Eyðun Klakstein*

**Fugloy:** Borgarstjórin í Fugloy seinastu fimm árini fekk flestar atkvøður, tá ið 29 av 40 veljarum vóru á kommunuvali í Fugloy í farnu viku.

Zacharias Zachariasen hevur sitið í bygdaráðnum seinastu 16 árini, og hann heldur fram tey næstu fýra.

– Enn er ikki greitt, um eg skal halda fram sum borgarstjóri. Eg skal kalla inn til fund, men tað havi eg ikki gjørt enn, tí tann eini limurin er burturstaddur, sigur Zacharias Zachariaen.

– Tað hevur ikki stóran skund at fáa skipað okkum, men vit gera tað sjálvandi áðrenn nýggjár, soleiðis sum tað skal gerast, sigur hann.

Umframt Zacharias Zachariasen sita Jóanes Christiansen og Amalja í Frammistovu í nýggja bygdaráðnum. Amalja varð vald fyri Absalon Lydersen, sum ikki stillaði uppaftur.

## Ternan um Leirvíksfjørð

Mánamorgunin fór Ternan undir sigling um Leirvíksfjørð, og har skal skipið sigla næstu tvær vikurnar saman við Dúgvuni.

Sam, sum vanliga røkir siglingina millum Klaksvík og Leirvík, er tikin úr sigling, tí hann skal hava nýggja rampu.

Meðan hetta arbeiðið verður gjørt, verða tað tí Dúgvan og Ternan, sum sigla um Leirvíksfjørð.

Um vikuskiftið fekk Dúgvan tekniskar trupulleikar við bóvportrinum, og leygardagin sigldi skipið ikki í nakrar tímar. Fyrrapartin mánadagin noyddist Dúgvan aftur úr sigling orsaka av tekniskum breki, og tá sigldi Ternan einsamøll.

**ek**

## Hava bíðað í sløk 50 ár

Tá ið Javnaðarflokkurin á nýggjárinum aftur fær borgarstjóran í Havn, verður tað fyri fyrstu ferð í langa tíð, at flokkurin eigur hendan sessin.

Seinasti Javnaðarmaðurin, sum var borgarstjóri í Havn, var Palli Henriksen, sum fór frá í 1957.

Síðani hevur tað ikki eydnast Javnaðarflokkinum at havt leiðaran í høvuðsstaðnum, og tað tóktist heldur ikki sannlíkt eftir kommunuvalið í síðstu viku.

Men ein heldur óvanlig uppgerð í Sambandsflokkinum hevði við sær, at Heðin Mortensen skifti flokk, og nú verður hann borgarstjóri umboðandi Javnaðarflokkin.

**ek**

## Føroyar hava lítið arbeiðsloysi

Samanborið við hini norðurlondini hava Føroyar lítið arbeiðsloysi. Í eini uppgerð, sum Vinnuhúsið hevur gjørt, sæst, at Føroyar hava næstlægsta arbeiðsloysið av øllum norðurlondunum.

Bara Ísland hevur lægri arbeiðsloysi, meðan Finnland toppar listan við 8,4 prosentum arbeiðsloysi.

Ísland hevði í triðja ársfjórðini í ár 2,6 prosent arbeiðsloysi, Føroyar høvdu 3,5 prosent, og síðani koma Noreg (4,5), Danmark (5,3), Svøríki (6,8), Grønland (7,5) og Finnland (8,4).

Uppgerðin byggir á standardiserað arbeiðsloysistøl hjá OECD og á tøl frá hagstovunum í Grønlandi og Íslandi.

**ek**

SOSIALURIN HEVUR FINGIÐ NÝGGJ NUMMUR

tel 34 18 00

fax 34 18 01

GOMLU NUMRINI RIGGA IKKI LONGUR

Sosialurin 341800

Sosialurin
teldupostur: post@sosialurin.fo
heimasíða: www.sosialurin.fo